# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Myrk skýggj og ljósglottar

Tíðirnar í Føroyum eru ikki sum tær hava verið leingi. Vit minnast øll góðu árini undan og eftir aldarskiftið, har einki var óført. Nú er vent í holini. Hetta merkir ikki minst vinnulívið. Vaksandi arbeiðsloysi boðar ikki frá góðum heldur. Keypiorkan er minni, og tað rakar so aftur handilslívið, sum so aftur rakar almennu kassarnar, tí minni MVG kemur inn osfr. Samfelagshjólini mæla rætt og slætt spakuligari. Og seinastu tíðindini um negativ úrslit hjá peningastovnum eru heldur ikki ov lovandi.

Hóast hesar heldur døpru sannroyndir nyttar ikki at fella í fátt og bara foksuera uppá tað negativa. Tað nyttar heldur ikki bara at leggja eftir politikarunum og geva teimum alla skyldina fyri skeivu gongdina. Tó at teir eru valdir til at umsita okkara tilfeingi og land. Uppgávan hjá okkum øðrum má alla tíðina vera at halda teimum til bæði við at k eggja teimum til at gera tingini betri og at finnast at, har tingini ikki verða gjørd nóg væl.

Men tað valdast. Myrku skýggini og kritikkurin mugu heldur ikki fáa fastatøkur á okkum, soleiðis at vit missa trúnna uppá, at nógv kortini ber til. Vit mugu ikki gloyma tann partin av vinnulívinum og samfelagshjólunum, sum koyra væl. Eitt nú blómandi alivinnuna.

Vit minnast øll spenningin og bjartskygnið, tá lunnar vórðu lagdir undir hesa vinnu síðst í farnu øld. Tá eldhugaðir undangongumenn fingu hugskotið at ala fisk í nótum á firðunum. Hetta var spírin til eina nýggja tíð í føroyskum vinnulívi. Í dag – 20 til 30 ár seinni – eru hesir spírar vornir til ein blómandi part av vinnulívinum, ið stendur fyri einum stórum parti av okkara útflutningi. Men tað hevur so sanniliga eisini verið møtimikið, tí menningin av alivinnuni hevur verið fyri stórum bakkøstum, bæði tí vit ikki dugdu nóg væl at handfara vinnuna og tí, at náttúran ikki alla tíðina var við okkum.

Neyðin lærir nakna kvinnu at spinna sigur orðafellið, og tað kann bara staðfestast her eisini. Tí skeivleikarnir og byrjanartrupulleikarnir í alivinnuni hava lært okkum nógv, so mikið nógv, at vit í dag eru millum fremstu alitjóðir í heiminum.

Í næstum verður so árliga aliráðstevnan hildin í Norðurlandahúsinum. Hon fer fram bert fáar vikur, áðrenn risastóra alisamtakið Bakkafrost verður skrásett á virðisbrævamarknaðinum í Oslo. Nógv er broytt má sigast. Tá alingin byrjaði var frítt spæl. Hvør Hanus og Janus kundi tá fara undir at ala, og alibrúkini tóku seg upp sum hundaland kring oyggjarnar. Her var tað entreprenør- og ævintýrandin, sum dróg verkið og sum líkasum var katalysatorurin. Tað skuldi til men sjálvandi varð eisini neyðugt at laga framleiðsluna og gongdina eftir umstøðunum, og í dag eru stórbrúk svarið. Men krøvini til professionalismu, dugnasemi og orku er tá eisini so mikið nógv størri.

Vónandi fáa vit eina góða og gevandi aliráðstevnu, sum verður við til at fáa myrku skýggini at kámast og lata okkum síggja møguleikar og ljósglottar fyri framman eisini. Gott í tykkum, sum reka og menna hesa vinnu.

**Sosialurin**

## Kæra viðvíkjandi framsøguviðurskiftum tingsins

TÓRBJØRN JACOBSEN



**Føroya Løgting**
á Løgtingið, 23. februar 2010
att. Løgtingsformaðurin/ formansskapur tingsins

Vanliga hevur mannagongdin viðvíkjandi framsøgurøðum á tingi verið alt eftir støddini hjá teimum ymsu flokkunum, soleiðis, at størsti flokkur byrjar orðaskifti og minsti flokkurin endar orðaskifti. Hetta er bæði logiskt, demokratiskt og rætt.

Ongin hevur varnast nakrar bygnaðartrupulleikar í hesi skipan, okkurt smávegis undantaki, men táið tingfundurin byrjaði ímorgun, varð ein heilt nýggj skipan sett í gildið, sum ongin uttan fyri formansskapin vitsti nakað sum helst um frammanundan. Nú var kravið brádliga, at framsøgufólkini í málinum skuldu vera á tingfundinum, táið orðaskiftið byrjaði, og teknaðu tey ikki til framsøgurøðina alt fyri eitt, var alternativið, at tingmaðurin og flokkur hansara mistu rættin til at bera fram síni sjónarmið í málinum – í eini framsøgurøðu.

Sjálvur skuldi eg vera framsøgumaður í tveimum málum á tingfundinum ídag. Hesi vóru:

1. 1. viðgerð av tingmáli nr. 87/2009: Uppskot til samtyktar um tilráðingar frá Norðurlandaráðnum í 2009 og um frágreiðing um virki ráðsins í 2009
   Málið verður beint í Uttanlandsnevndina
2. 1. viðgerð av tingmáli nr. 95/2009: Uppskot til samtyktar um tilráðingar frá Útnorðurráðnum í 2009
   Málið verður beint í Uttanlandsnevndina

Tað er egin feilur at vera ov seinur á tingfund, og í morgun var eg nakrar minuttir ov seinur. Hetta er ikki gerandiskostur, og man eg vera ímillum teir drúgvastu, táið tað snýr seg um at møta á tingi, seinastu tingsetuna møtti eg m.a á øllum teimum ásettu tingfundunum, og í hesi tingsetuni er lagið tað sama. Ímorgun var nú so illa kavagrivið á okkara leiðum í Eysturoy, at tað var ein fyritøka at fáa akfarið út á landsvegin, mátti mobilisera alt grannalagið fyri at kunna førka meg, hetta var tíverri orsøkin til mína seinking, men dulda og loyndarfulla avgerðin hjá formansskapinum, sum teir fýra í formansskapinum eftir øllum at døma einans hava kunngjørt fyri hvørjum øðrum ella sær sjálvum, fyri at tingfundurin byrjaði í morgun, eigur ikki í sær nakra force majeure áseting. Sjáldsamst má tað eisini sigast at vera, at hetta skiftið skuldi koma so brádliga, nú ringasti kavaverturin í eitt manna minni herjar landið, og eftir at tað hevur kavað av møkum júst hesar seinastu dagarnar.

Táið komið var í tingsalin nakrar minuttir yvir 11 ímorgun, bað eg um at fáa orðið, sum framsøgumaður í tingmáli no. 87/2009. Tástaðni fekk eg at vita um hesa nýggju mannagongdina, ið formansskapurin hevði sett í verk. Harvið kundi eg ikki verða framsøgumaður í tingmálinum, og av tí sama slapp størsti flokkur á tingi ikki flyta fram síni sjónarmið um tilráðingarnar frá Norðurlandaráðnum 2009.

Formaðurin í tingbólkinum hjá Tjóðveldinum hevur onga fráboðan fingið um hetta skiftið, teir tingmenn eg havi tosað við um málið vitstu heldur onki, tí tykist tað sum, at formansskapurin er farin at uppfata seg sjálvan sum eina “juntu”, har stjórnað verður við dekretum, sum ongin fær nakra fráboðan um, fyrrenn tey vera sett í verk, - at kalla í óðum verkum.

Sjálvur eigi eg ta fullu og heilu ábyrgd av seinkingini í morgun, men tað vóru greiðar force majeure orsøkir til, at undirritaði var nakrar minuttir ov seinur á tingfundin. Avleiðingin er tann óvanliga ódemokratiska, at flokkurin, sum hin einasti, orsakað av eini ókendari avgerð í formansskapinum frammanundan at tingfundurin varð settur ímorgun, var forðaður í at bera fram síni sjónarmið í tingmáli no. 87/2009 ídag.

Harafturat skal nevnast, at 7 mál, sum stóðu framman fyri tingmál no. 87/2009 á skránni, vórðu umlopin, og tí var farið beinleiðis til viðgerðina av omanfyrinevnda máli, og kanska broytti hetta eisini fyritreytirnar soleiðis, at Tjóðveldi varð útihýst frá viðgerðini á tingfundinum ídag.

Hervið er hendan kæran flutt formanskapi Føroya løgtings.

cc: Annita á Fríðriksmørk, formaður í tingbólki Tjóðveldisins.
fjølmiðlarnir.

## Arsenal-viðhaldsfólk hittast

TÍÐINDASKRIV

Hóast enska stórliðið Arsenal ikki varð spátt stórvegis møguleika at vinna meistaraheitið í ár, so eru Wenger og hansara ungu menn, enn við í oddastríðnum. Enn eru 11 dystir eftir at leika og klárar Arsenal at henga í, ja, so hevur venjarin Arsène Wenger enn einaferð prógvað, at hann veit betri enn øll onnur.

Eisini føroyska fjepparafelagið, Arsenal Faroe Islands, ið er alment góðkent av Arsenal í London, er sera virkið og skipa tey javnan fyri tiltøkum, umframt at hava eina sera væl vitjaða og forvitnisliga heimasíðu arsenal.fo. Har býðst høvið at gera viðmerkingar til dystir, at velja besta leikara og annars at kunna seg um alt, ið fyriferst í felagnum, bæði í London og í Føroyum. Eisini hevur felagið skipað fyri felagsferð til London, har ið stjørnan frá 70’unum Charlie George, var vertur teirra á rundferð á leikvøllinum The Emirates. Felagið hevur eisini møguleika at veita limum sínum atgongumerki til dystir.

Komandi leygardag verður felagstiltak, har ið fjepparar hittast á loftinum á Café Natúr í Tórshavn. Dysturin ímóti Stoke er á skránni. Dysturin byrjar kl. 17.30 og verður loftið á Café Natúr staðið, har ið øll Arsenal-viðhaldsfólk fara at fylgja og stuðlu monnum sínum í oddastríðnum í bestu ensku fótbóltsdeildini.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.